# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Hervør Joensen 50 ár

Í gjár, fríggjadagin 8. apríl, varð Hervør Joensen í Klaksvík hálvt hundrað ár. Hervør er klaksvíkingur, og hon hevur búð í Klaksvík nógv størsta partin av lívinum.

Hervør er dóttir Mary Mørkøre. Foreldrini hjá henni vóru Torkilda ella Kilda, sum hon altíð hevur verið nevnd, og Herluf Mørkøre í Klaksvík, sum búðu í Víkunum. Árið eftir at Hervør var fødd, giftist mamma hennar við Símuni Paula Johannesen úr Haraldsundi, og Hervør kallaði hann fyri pápa, og hann var pápi hennara.

Tá ið Hervør var trettan ára gomul, flutti hon til Keypmannahavnar, har mamman tá búði. Nøkur ár seinni flutti Hervør aftur til Klaksvíkar, og tá var hon hjá ommuni.

19. mai í 1979 giftist Hervør við Poul Jacob Joensen, sum er ættaður úr Miðstovuni á Syðradali. Poul Jacob er útróðrarmaður og eigur Háenni. Hervør er ógvuliga áhugað í vinnuvirkseminum hjá manninum.

Brúdleypsdagurin hjá teimum í 1979 var minnisríkur, tí tað var stórkavi í Klaksvík henda dagin. Soleiðis var tað ikki í fjør, tá ið tey bæði hildu væl eydnaða silvurbrúdleypsveitslu í Skálanum.

Hervør og Poul Jacob eiga tvær døtrar - Mary og Gerda. Mary er gift Rúna Christiansen úr Norðdepli,



og tey eiga tveir synir - Debes og Poul Jacob.

Hervør hevur arbeitt nógv í handli, og so hevur hon eisini verið nógv í fiskaarbeiði. Nú er hon í Eystís á Skarðhamri, har tey arbeiða saltfisk.

Heimið hjá Hervør og Poul Jacob er opið, og tey eru ógvuliga gestablíð. Hervør er góð við børn, og tey eru góð við hana. Hon hevur serligt hegni at fáaast við eldri og gomul fólk. Hon er altíð við, tá ið tiltøk verða fyriskipað fyri tey eldru, og nú er hon vald í eldrabólkin, sum skipar fyri tiltøkum ætlað teimum eldri í Klaksvík.

## Símun Einarsson 50 ár



Mikudagin 6. apríl varð Símun Einarsson í Lamba 50 ár. Hann hevur verið sjómaður alla sína tíð, og nú hann fór um tey hálvt hundrað, var hann á búrfiskaveiðu suðuri við Azorurnar.

Símun er ættaður úr Rituvík. Hann er sonur Trinu og Einar Einarsson. Tey eru fimm systkin - Eiler, Hensia, Hanna, Símun og Laura. Eiler og Laura búgva í Rituvík, Hensia býr í Havnini, og Hanna býr í Saltangará. Einar doyði í 1981, og Trina doyði týsdagin í hesi vikuni. Hon fer til gravar í dag, men tað bar ikki til hjá yngra soninum at vera við til jarðarferðina hjá mammuni. Soleiðis hevur luturin hjá sjómonnunum ofta verið.

Símun Einarsson er av tí gamla slagnum av føroyskum sjómonnum. Hann hevði ikki meiri enn fingið prestsins hond á høvdið, tá ið hann fór til skips, og síðani hevur hann so at siga bara verið í vinnu á sjónum. Okkurt stutt skifti hevur hann arbeitt á landi, men tað hevur ikki verið leingi. So hevur trongdin eftir aftur at sleppa at flóta og at fara til fiskarí vunnið.

Tá ið Símun fór til skips sum 14 ára gamalur, var tað við Bjørgvin, sum Jákup Joensen í Leirvík førdi. Síðani var hann við Suðurland, Vestfart og Stapanum. 1975-1976 gekk hann á skiparaskúla, og síðani var hann við Havørnini. Av og á loysti hann av sum bestimaður. Í 1982 fór hann við Stjørnuni, sum partrolaði við Polarhav. Í 1987 fór hann við Ametyst, sum partrolaði við Jaspis. Hann stýrimaður og loysti av sum skipari.

Miðskeiðis í níti árunum fór hann saman við Harry á Lakjuni, sum hann hevði samstarvað nógv við í partrolingini, við Boðasteini, sum fuglfirðingar áttu. Símun var stýrimaður og avloysara skipari, og tað var tá, at teir fóru at royna eftir búrfiski syðri í Atlantshavinum, enn føroyingar vanliga høvdu roynt.

Tá ið vágbingar keyptu Boðastein í 2002, og hann aftur gjørdist til Roc Amador, fylgdi Símun við, og har var hann, inntil hann fyri stuttum saman við øðrum keypti Rán, sum hann nú er á búrfiskaveiðu við.

Símun er av raskastu sjómonnum. Hann hevur ongantíð spart seg, hann dugir alt arbeiði, og so hevur tað ikki minst at siga, at hann er sera fryntligur og lagaligur at vera saman við.

Símun giftist 15. mai í 1978 við Sonju Johannesen, sum er ættað úr Lamba. Tey bygdu á Byrgisheygnum, og tey eiga trý børn - Sigurjón, Sóley og Sámal. Sóley er gift Jóhan Sundskarð úr Klaksvík, og tey eiga ein son.

Frá tí hann var lítil smádrongur, hevur veiðuhugurin ligið til Símun, og soleiðis er tað framvegis. Tá ið hann er heima, dámar honum væl at fara við byrsuni at skjóta fugl og harur, og hann hevur ikki verið leingi heima, tá ið hann fer á flot saman við verfaðirinum.




### Brúdleyp

Í dag, kl. 8.00 giftast í Kollafjarðar kirkju Oddny H. Hansen úr Kollafirði og Petur (Piddi) Olsen úr Runavík. Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Kollafirði frá kl. 9.30.

í dag 9. apríl kl. 11.00 giftast í Kollafjarðar kirkju Heidi Borum Hansson, Hoyvík og Ronnie Korsager Davidsen, Kollafjørður.

### Prógv

Børge Jimmy Højmose Christiansen frá Revisionsfirmaet Højmose har januar 2005 bestået eksamen som Statsautoriseret Revisor ved Norges Handelshøyskole i Bergen.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum gjørdu mær 90 ára føðingardagin ógloymandi.
Tøkk fyri gávur, blómur, fjarrit og hugnaligar telefonsamrøður.

**Vinarlig heilsan**
**Margretha Magnussen, Vágur**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri hjálp og sýnda samkenslu, tá ið okkara kæri maður og fosturpápi

**Nicodemus Brimsvík**
**Strendur**

andaðist og varð jarðaður.

Takk til tykkum øll, sum vóru um hann heima, á Giljagarði og á Landssjúkrahúsinum.
Takk fyri blómur og kransar og fyri minnisgávur til Neria.
Tøkk til tykkum, ið á annan hátt hjálptu og vístu beinasemi við jarðarferðina og ervið.
Vit takka Harranum fyri at hann flutti Demus heim, og at hann nú hevur tað gott.
Tøkk, øll somul fyri alt.

Heilsan við sálmi 98,2.
Harrin signi tykkum øll.

*Tey avvarðandi*
**Bette og Eli við fam.**

### Dagurin

**9.apríl. Procopius**. Talan er kanska um tann Prokorus, sum er nevndur í Ápostlasøguni 6,5. Segðist vera bróðursonur Stefans.

**10. apríl. Ezekiel.** Ein av teimum fýra stóru profetunum í Gamla testamenti.
Navnið merkir Guð er sterkur.

**11. apríl. Leo,** deyður í 461. Pávin Leo I, nevndur tann Mikli. Hann talaði Artala húnakong frá at hertaka og ræna Róm.
Navnið Leo merkir *leyva*.

### Andlát

31. mars
Jensia Christensen, fødd Jacobsen úr Kaldbak, 81 ár.
Mella Dahl, Tórshavn, 94 ár.
Petronella Malvina, vanliga nevnd Nella Dahl, fødd Egholm, Tórhsavn, 94 ár.

2. apríl
Arna Clementsen av Sandi, 74 ár

3. apríl
John Nolsøe, ættaður av Tvøroyri, 70 ár.

5. apríl
Katrina Einarson, Rituvík, 83 ár